# Gott lutakast hjá AB

Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir í AB fingu eitt gott lutakast í donsku steypakappingini í gjár. AB skal í fjórða umfari av steypakappingini spæla ímóti Danmarkseriuliðnum Nordvest FC. Í seinasta umfari sendi AB, sum spælir í næstbestu donsku deildini, superligaliðið FC Midtjylland úr steypakappingini. Venjarin hjá Christian Høgna Jacobsen - hann eitur Flemming Christensen - sigur við bold.dk, at AB nú hevur ein góðan møguleika at koma víðari í steypakappingini. AB og Nordvest FC spæla mikudagin 29. oktober.




# 11 ára gamal til Chelsea

11 ára gamli fraklendingurin, Jeremy Boga, skal nú spæla fótbólt í Chelsea. FIFA-reglurnar seta annars bann fyri at gera sáttmála við ungar útlendskar spælarar, men pápi Boga starvast í London, og tí ber til at snúgva sær undan reglunum. Boga hevur spælt fótbólt í seks ár, og hevur hann higar til verið knýttur at lítla felagnum, ASPTT í Marseille, men bæði Lyon og Monaco hava roynt at fingið fatur á spælaranum.




*Fóturin var í gipsi, men Allan Mørkøre segði einki við venjaran, og so spældi hann kortini, sum um einki var hent, tá minniligi sigurin í Landskrona varð vunnin*

# Hevði forboð móti at spæla

**Tey flestu vita, at Allan Mørkøre var partur av undrinum í Landskrona. Tey fæstu vita, at Allan Mørkøre als ikki skuldi verið partur av dystinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stutt undan fráferðini til Landskrona varð Allan nevnliga skaddur í dysti fyri KÍ. Úrslitið av hesum varð, at tá 18 ára gamli spælarin fekk fótin í gips, og so ber jú ikki heilt so væl til at spæla. Í øllum førum ikki so leingi, sum gipsið er á fótinum.

- Eg vildi jú fyri alt í verðini spæla. Eg var akkurát blivin partur av A-landsliðnum, og uppgávan ímóti Eysturríki var jú størsta avbjóðing, sum Føroyar nakran tíð høvdu fingið innan fótbóltin. Páll (Guðlaugsson, venjari, blðm.) visti einki um hetta, og eg ætlaði mær avgjørt ikki at fortelja honum nakað sum helst, sigur Allan Mørkøre, tá hann minnist á hetta.

- Eg arbeiddi hjá Flugger tá, og eg minnist væl, at eg tók ein saks á skrivstovuni og byrjaði at klippa gipsið av. Tað var bara tað, at saksurin beit einki serligt, so eg visti ikki reiðiliga, hvat eg skuldi gera. Eg tordi illa at fara á sjúkrahúsið at biðja tey hjálpa mær, tí tey høvdu heilt vist noktað at taka gipsið av.

- Men at enda var tað einasti útvegurin. Og hóast tey ráddu mær frá hesum, so stóð eg fast við mítt. Og eg segði enntá við tey, at hetta var mín ábyrgd.

Og tað hevur tú nokk ikki havt orsøk at angrað síðani?

- Nei, avgjørt ikki. Tíbetur havi eg ikki kent nakað mein av hesum síðani, og talan var jú um eina fantastiska upplivin. Og so kann eg sjálvandi halda fast um, at sigurin ikki var komin, um eg ikki spældi við, sigur Allan flennandi.

## Størri enn Parkin

Fáar vikur seinni var Allan Mørkøre í enn størri fokus, tá hann var maðurin, sum við tánni prikaði bóltin inn um Peter Schmeichel, tá Føroyar javnaðu til 1-1 í Parkini. Danir vunnu dystin 4-1, men eina løtu stóð danski parturin av kongaríkinum vantrúgvin og hugdi at, meðan fiskimenninir úr Atlantshavi royndu at floyngja Laudrup, Schmeichel og allar hinar stjørnurnar.

Hóast hetta eisini var stór uppliving, so er Allan Mørkøre tó ikki í iva um, at upplivingin var enn størri í Landskrona.

- Tað var jú fyrsti altjóða dysturin, og vit vunnu hann. Eftir sjálvan dystin var eg somikið troyttur, at eg minnist ikki veruliga, hvat hendi tað kvøldið. Men heimkoman til Føroya var heilt, heilt fantastisk.

- Tað byrjaði á Flogvøllinum, har fólk vóru komin út úr terminalinum at taka ímóti okkum, og tað hevði neyvan gingið í dag. Røður og blómur vóru á skránni, og tað var tað allastaðni, har vit komu.

- Men mest serligt var tað tó, tá vit komu aftur til Klaksvíkar. Torleif Sigurðsson, Kurt Mørkøre og eg sjálvur fylgdust. Og tá báturin skuldi leggja at, bað ein av manningini okkum um at koma framat, tí – sum hann segði – so var helst nakað av fólki og tók ímóti okkum.

- Men vit vóru als ikki fyrireikaðir upp á, at har stóð mest sum hvørt mansbarn í Klaksvík og tók ímóti okkum. Liðfelagar okkara í KÍ komu so rennandi umborð, og síðani vórðu Kurt og eg bornir í land í gullstóli. Tað bara heilt fantastiskt, sigur Allan Mørkøre.

# Borðtennisinstruktørur á vitjan

**Um vikuskiftið hevur Borðtennissambandi Føroya havt vitjan av einum útbúnum borðtennisinstruktøri**

BORÐTENNIS
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Leygardagin og sunnudagin hevur svenski borðtennisinstruktørurin, Jan Berner, verið og vitjað í Føroyum. Tað er Borðtennissamband Føroya (BTSF) sum hevur fingið instruktørin til Føroya, her hann hevur hildið skeið fyri borðtennisleikarum og borðtennisvenjarum. Jan Berner arbeiðir sum instruktørur fyri altjóða borðtennissambandið, ITTF. Í Føroyum hevur hann hildið eitt skeið, sum av teimum mongu skeiðunum kallast "level 1". Tað er eitt grundskeið, sum inniheldur frálæru av mest grundleggjandi venjingarhættunum hjá borðtennisvenjarunum.

Jan Berner er ein væl virdur instruktør, sum stórt sæð bara hevur verið og lært frá sær í Afrika og Asia. Fyrstu ferð hann undirvísti í Evropa var fyri tveimum vikum síðani, tá ið hann undirvísti í Íslandi. Um vikuskiftið var hann altso í Føroyum.

## Fjølbroytt

Í undirvísingini hevur Jan Berner ikki bara staðið og fylt skeiðluttakararnar við orðum, men fyri at gera tað heila veruligari, hevur eisini verið spælt borðtennis, soleiðis at tingini, tosað hevur verið um, verða roynd av. Hetta hevur verið við til at gjørt tingini betur skillig.

Í undirvísingini hevur Jan Berner eisini víst fram dømi frá borðtennisvenjingum á sjónvarpsskýggja, so tað hava verið nakrir lívligur undirvísingartímar, sum hava gingið fyri seg í Eysturskúlanum í Havn.

## Liður í OyL-fyrireiking

Venjaraskeiðið hevur havt fyri eyga at ment borðtennisvenjarar í Føroyum. Eitt, sum sambært formanninum í BTSF, Andras Nolsøe, er ein mangulvøra í Føroyum. Andras sigur, at hetta er ein liður í einari eitt ára langari fyrireiking til Oyggjaleikirnir komandi ár. Fyrireikingarnar halda longu fram tíðliga í komandi mánaða, tá ið landsliðið í borðtennis fer til Danmarkar á venjingarlegu og at leika venjingardyst ímóti útvaldum liði av Lollandi.

Aldursforsetin og ein av lyklaleikarunum á føroyska landsliðnum í nógv ár, Kjartan Eli Hentze, hevur boðað frá, at hann ikki ynskir at verða úttikin til Oyggjaleikirnar aftur. Tískil verður tað væntandi eitt sera ungt lið, sum verður sent avstað at umboða Føroyar komandi Oyggjaleikir.